Fra: Firouz Gaini, Keypmannahavn
Dato: 23.01.01
Til: birgir@sosialurin.fo
Emne: VIKUSKIFTI

**TELDUBRÆVIÐ**

# Hirschsprung

Fyrst í nítjandu øld flýddi jødiska Hirschsprung-familjan úr Týsklandi vegna kríggj og setti búgv í Keypmannahavn. Pápin hevði verið tubakksframleiðari í Týsklandi og tann eini sonurin, Heinrich, føddur í Danmark í 1836, valdi sær somu yrkisleið. Heinrich vann sær nógvan pening av sigarsøluni og fór at keypa sær nýggja danska málningalist, ið hann hevði so stóran áhuga fyri. Nýgiftur, í 1860´unum, byrjaði hann so smátt at keypa forvitnislig listaverk, men skjótt vóru Pauline og Heinrich um at drukna í málningum í sínum stásiliga heimi á Højbro Plads. Savnið taldi meira enn 1000 málningar, skitsir, tekningar og standmyndir av Eckersberg, Købke, Bendz, Marstrand, Ancher, Hammershøi og øðrum, tá ið ríkmaðurin Heinrich í 1908 doyði.

Í 1902 valdi Hirschsprung at geva sítt einastandandi savn av danskari list í gávu til statin, við eini treyt: at Keypmannahavnar Kommuna lat grundstykki til nýggjan museumsbygning og átók sær uppgávuna at reka listasavnið Den Hirschsprungske Samling saman við statinum. Í 1911 opnaði sjálvsognarstovnurin Den Hirschsprungske Samling á Stockholmsgade (beint yvir av risastóra Statens Museum for Kunst) fíggjað av statinum, kommununi og einkjuni eftir Heinrich, ið ikki náddi at síggja listasavnið sjálvur. Tann friðaði bygningurin, teknaður av kenda arkitektinum H.B. Storcks, hevur ein hóp av smáum stovum, ið geva savninum, eftir persónliga ynski Hirschsprungs, ein intiman og heimligan dám. Á veggunum hanga teir smáu málningarnir lið um lið, stílurin úr borgarligum heimum kring Evropa tá í tíðini. Fyrsti leiðari á listasavninum, Emil Hannover, ið var góður vinur við og listarligur ráðgevi hjá Heinrich, og sum giftist við einastu dóttir hansara, komponeraði tey 21 rúmini á savninum við málningum, standmyndum og møblum úr nítjandu øld, so at alt passaði saman í eina størri heild. 90 ár seinni er nærum onki broytt. Tey umleið 500 listaverkini, ið hanga á bróstunum, eru við fáum undantøkum tey somu sum Hannover í 1911 hongdi upp.

Í sali nummar 21, hjá Skagensmálaranum P.S. Krøyer (1851-1909), er ein stórur málningur av Heinrich, Pauline og børn teirra. Hirschsprung-familjan situr í sínum fínasta stási uttanfyri sína villa norðan fyri Keypmannahavn ein vakran summardag, og á borðinum uttanfyri standa tekoppar og vingløs. Eitt vínglas ov nógv. Tað er glasið hjá gestinum hjá familjuni, Krøyer, ið skapar málningin. Glasið er hansara signature. Heinrich Hirschsprung er eisini í forhøllini, stórur og prúður við sigar í hondini tekur hann ímóti gestunum, tá ið teir koma inn á listasavnið. Undir loftinum í forhøllini er ein verndareingil málaður og undir fótunum hevur tú stóra mosaikk av tubakksplantu! Um listaverkini hjá Hirschsprung høvdu endað á Statens Museum for Kunst, so hevði ongin í dag vita hvør hesin sigarmaðurin var, men hann hevur vitað hvussu navn hansara skuldi yvirliva tey næstu ættarliðini og knýtast til naturalistiska og súmbolska list í Danmark: við at gera sjálvsognarstovn undir familjunavninum.

Lat meg enda hetta kapittul úr Keypmannahavnar søgu við at nevna, at bjór og tubakk hava havt størri týdning fyri listina í hesum landi enn tey flestu vita av. Pengarnir hjá ríkum monnum, ið hava selt tubakk og bjór, standa aftan fyri tvey av teimum vakrastu søvnunum í Keypmannahavn: Ny Carlsberg Glyptotek og Den Hirschsprungske Samling.

# Pokémon

SPØL
*Elinborg Joensen*

Nógv hevur verið at hoyrt og sæð um tann sonevnda Pokémon seinastu tíðina. Børn í øllum aldri flokkjast um hesar verur, ið líkjast lítlum ódjórum. Men hóast hetta, er almikil gravgangur eftir teimum. Ongantíð áður hevur ein vøra selt so nógv. Bara í USA eru yvir 4. mió. telduspøl seld. Og sambært New York Times hevur Nintendo brúkt yvir 20. mió. dollarar, at marknaðarføra Pikachu og hinar Pokémonarnar við.

Tað munnu vera fleiri, ið undrast á gravgangin eftir hesum verunum. Hvat er so spennandi við Pokémon, sum Bøllar, Yoyo, Turtles, Barbie og Actionmen ikki hava? Eg dugi ikki nágreiniliga at svara hasum spurninginum, men okkurt bendir á, at »yvirnáttúrligar« kreftir eru orsøkin. Eg fari at loyva mær at seta »yvirnáttúrligar« í gásareygu, tí at meira er millum himmal og jørð, enn vit vita um.

Spælið snýr seg um, at tað finnast 151 sløg av Pokémon. Tað ræður um at fáa allar hesar 151 figurarnar, um tað so er í kortum ella figurum. Tú ert ein Pokémon-venjari í spælinum, sum skal gera tínar Pokémonar sterkari og sterkari, so at teir vinna á hinum, og teir mennast alla tíðina.

Í teimum kristiligu miðlunum hevur leingi verið illgruni um sambandið millum Pokémon og eysturlendskar átrúnaðar, okkulta samsvarið við »Dungeons & Dragoons«, og tey kortini, sum hoyra til, sum børn millum 4 og 14 ár dámar sera væl at skifta sínámillum. Í USA eru hesi kortini bannað í fleiri skúlum. Seinast í Orlando, Florida, har børnini seldu matpakkar og stjólu skúlataskur fyri at skifta um kort, ella hóttu við harðskapi, tí at kortini høvdu ringa ávirkan á tey.

Sambært amerikanska tíðarritinum »Charisma« er tað vanlig uppfatan, at Pokémon kortini ávirka børnini sum illir andar. Tey elva til klandur, havisjúku og asosialan atburð, í staðin fyri at fremja sosialan atburð og fríar ræsur at nýta hugflogið. Eisini hevur filmurin um Pokémon, »The First Movie« verið orsøkin til fleiri epilepsitilburðir hjá børnum.

Tað er talan um trý element, jørð, sjógv og luft – hetta er tann japanska trúarlæran.

Eisini kundu Pokémonverurnar undirbygt menningarlæru Darwins. So tað kundi væl borið á, at talan er um átrúnaðarligan íblástur.

Hvat er alt hetta fyri nakað, kunnu vit spyrja okkum sjálvi. Summi siga, at tað bert er eitt »trend« sum man fara at ganga út um stutta tíð. Onnur vilja vera við, at talan er um átrúnaðarligan íblástur. Hesir hugburðir nýtist okkum ikki at leita leingi eftir, tí vit finna teir nevniliga eisini her hjá okkum. Føroysku handlarnir eru heldur ikki samdir hesum viðvíkjandi. BR í Havn hevur tikið vøruna av hillini, vegna átrúnaðarliga illgrunan, meðan Griffilin í SMS ikki heldur tað vera neyðugt at taka vøruna av hillini, nú sølan gongur sum heitt breyð.

Eg eri sjálv ikki heilt greið um støðuna. Men eg meti tað vera sera týdningarmikið, at hava eyguni opin hesum viðvíkjandi. Tí at tey andaligu tingini eru ikki at spæla við. Men eg eri sannførd um, at eru vit persónliga kristin, so kunnu hvørki Pokémon, ella nakar illur andi taka ræðið á okkum. So mín áheitan er: Verið ansin, tí at meira er millum himmal og jørð, enn vit vita um.


*Elinborg Joensen, sum gongur í 10.d í Eysturskúlanum, er í starvsvenjing á Sosialinum.* *Mynd: Jens Kristan Vang*




T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

## Felagsinnskriving í
### Tórshavnar kommunalu skúlar skúlárið 2001/2002

Foreldur ella verjar, ið ætla at lata barn/børn fødd fyri 1. januar 1995 í **1. flokk í Argja skúla, Venjingarskúlanum, Tórshavnar Kommunuskúla, Sankta Frans skúla, Eysturskúlanum ella Hoyvíkar skúla** næsta skúlaár, verða biðin at siga frá í býráðssalinum 29. ella 30. januar 2001.

**Innskrivingin**
Innskrivingin í allar skúlarnar er í býráðssalinum **mánadagin 29. og týsdagin 30. januar, báðar dagarnar frá kl. 3-6 seinnapartin. Havið dóps/navnabræv við.**

Skúlaráðið skipar fyri einari felagsinnskriving. Pláss er ikki fyri øllum teimum næmingunum, sum búgva næst við ávísar skúlar í býnum, tí er neyðugt at flyta næmingar í skúlar, har pláss er.

**Eisini ber til at ringja**
Møguleiki er eisini at ringja í býráðssalin somu tíð tlf. 31 71 60.

**Skúlaumbøn**
Tað ber til at biðja um at fáa barn/børn í ein av skúlunum. Skúlaráðið fer saman við skúlastjóranum at kanna eftir, um tað er gjørligt, sum plássviðurskiftini í skúlanum eru. Tá ið felagsinnskrivingin er liðug, fær hvør skúli boð um, hvørjir næmingar skulu koma í 1. flokk.

**Argja skúli**
Næmingarnir á Argjum fara í skúla kl. 11.40, men kunnu fara í Frítíðarskúlan fyrrapart.

**Kollafjarðar skúli**
Innskriving í Kollafjarðar skúla er í skúlanum **mánadagin 29. januar, frá kl. 3-5 seinnapartin.**

**Kaldbaks skúli**
Innskrivingin í Kaldbaks skúla er í skúlanum ella á tlf. 31 78 45.

**Frítíðarskúlin**
Børn, ið skulu í Frítíðarskúlan, verða **ikki** innskrivað í býráðssalinum, men umsóknarbløð til Frítíðarskúlan fáast í býráðssalinum, heimasíðu kommununnar (www.torshavn.fo), í Snarskivuni ella á tlf. 31 51 60.

**Meira fæst at vita**
Meir fæst at vita um innskrivingina í skúlanum ella hjá Tórshavnar skúlaráði, Jákupi Simonsen, skrivara, tlf. 31 51 60.

**Tórshavnar skúlaráð og Kollafjarðar skúlanevnd**

S N A R S K I V A N



T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

## Leiðari

Í sambandi við at frítíðarskúli letur upp í Skótahúsinum í Kollafirði í mars mánað til 25 børn, søkir Tórshavnar kommuna við hesum eftir leiðara.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum grannalagi, har náttúran og ítróttur hava stóran týdning í dagliga arbeiðnum.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin kann:

- arbeiða sjálvstøðugt
- vera førur fyri sjálvur at taka avgerðir í arbeiði sínum
- virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og skúlan
- hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Trivnaðarfyrisitingini, boks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 12. februar 2001.

S N A R S K I V A N



## P/F Fjarhitafelagið søkir
## MASKINMEISTARA

Søkt verður eftir einum maskinmeistara við fullari maskinmeistaraútbúgving.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Maskinmeistarafelagið og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til P/F Fjarhitafelagið, telefon 319559, og tosa við Jóannes Hansen, stjóra.

Umsókn saman við prógvum og møguligum ummælum verður at senda til:

**P/F Fjarhitafelagið,**
att.: Jóannes Hansen, stjóra
Postboks 3215, 110 Tórshavn



## Teldukoyrikort í Runavík



Nýtt dagskeið í teldukoyrikorti byrjar í Runavík
**mánadagin 5. februar**

Tekning á telefon 311115

formula.fo



## Ekonomimedarbetare

Vi söker två medarbetare til avdelningen för ekonomi-, IT- och service- (EIS). Arbetet innebär att du framförallt skall arbeta med
- bokföring, avstämning, kontroll av konton och ekonomiska rapporter
- räkenskapsmässig registrering av projekt
- utvecklingsarbete inom redovisningsområdet
- övrigt förekommande arbetsuppgifter

Du skall ha relevant ekonomisk utbildning och dokumenterad erfarenhet av arbete med bokföring och redovisning. Arbetet förutsätter en god PC-vana, god kännedom om ekonomisystem är meriterande. Vi förutsätter att du har god förståelse av ett av de nordiska språken samt engelska.

Vi ställer stora krav på samarbetsförmåga, förmåga till självständigt arbete, stresstålighet, flexibilitet och serviceförmåga.

**Intresserad?**
Rekvirera ansökningsblankett och ytterligare information per fax, brev eller från hemsidan: www.norden.org
Sista ansökningsdag är 16 februari 2001.

Nordiska
RÅDET & MINISTERRÅDET
Box 3035
DK-1255 Köpenhamn K
Fax +45 33 11 78 50 eller
+45 33 96 02 02

*Nordiskt samarbete sker mellan Danmark, Finland, Island, Norge och Sverige samt de självstyrande områdena Färöarna, Grönland och Åland.*



## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Peugeot 306 XL, 1,4 Atlantis 5/H
**Árg.:** 1995
**KM.:** 66.529
**Eyka útgerð:** Airbag, 5 gear, met. lakk.

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

tlf. 345600 - lokal 728
fax nr. 345607
at hitta millum kl. 10.00 og 12.00